tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 17. april 2020 kl. 10:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan -Eykafundur |

**Møtt:** Kristin Michelsen, Bjarni Hammer, Anita Vibergsdóttir, Bogi Johannesen, Alvi Mortensen, Súsanna Bertholdsen

**Ikki møtt:** Kristina Roest, fráboða

**Skrivari:** Fróði Mortensen

## Yvirlit yvir mál til viðgerðar


| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 1 | Setanarbólkur til skrivstovunæming | 2 |
| 2 | Setanarbólkur til farloyvisstarv sum leiðari fyri ungdómshúsið -Pakkhús 4 | 2 |
| 3 | Setanarbólkur til leiðarastarvið á Kunningarstovuni -barnsburðafarloyvisstarv | 3 |
| 4 | Leingjan av tiltøkum at fyribyrgja smittu av Corona virus | 3 |

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 17. april 2020 kl. 10:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan -Eykafundur |

**81.01.08-A00-1-20**

## 1. Setanarbólkur til skrivstovunæming

### Málsfrágreiðing

**Kommunustjórin 7. apríl 2020**
Tvøroyrar kommuna lýstið eftir skrivstovunæmingi, við freist til 16. mars, og innkomnar eru 5 umsóknir. Umsitingin ætlar at vera liðug við innstillingina í viku 17, og mælir til at samanseta setanarbólkin, ið skal innstilla til starvið at vera:

- Fróði Mortensen, kommunustjóri
- Amy Bech, fíggjarleiðari
- Jennie Debes, skrivstovufólk
- Eyka/ eftir tørvi Lasse Jensen, málsviðgerði

### Avgerð

Einmælt samtykt at fylgja tilmælið hjá umsitingini við samansetingini av setanarbólkinum.

**81.02.00-1-20**

## 2. Setanarbólkur til farloyvisstarv sum leiðari fyri ungdómshúsið -Pakkhús 4

### Málsfrágreiðing

**Kommunustjórin 7. apríl 2020**
Tvøroyrar kommuna hevur søkt eftir leiðara til ungdómshúsið Pakkhús 4, sum farloyvisstarv í 1 ár. Freistin at søkja starvið var 16. mars og innkomnar eru 2 umsóknir. Umsitingin ætlar at vera liðug við innstillingina í viku 17, og mælir til at samanseta setanarbólkin, ið skal innstilla til starvið at vera:

- Fróði Mortensen, kommunustjóri
- Amy Bech, fíggjarleiðari
- Pól Arni Holm, leiðari av Eftirskúlanum
- Eyka/ eftir tørvi Lasse Jensen, málsviðgerði

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 17. april 2020 kl. 10:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan -Eykafundur |

**Avgerð**

Einmælt samtykt at fylgja tilmælið hjá umsitingini við samansetingini av setanarbólkinum.

**81.02.00-G01-1-20**

## 3. Setanarbólkur til leiðarastarvið á Kunningarstovuni -barnsburðafarloyvisstarv

### Málsfrágreiðing

**Kommunustjórin 7. apríl 2020**
Tvøroyrar kommuna skal hava nýggjan leiðara til Kunningarstovuna, nú verandi leiðarin ferð í barnsburðarfarloyvi í eitt ár. Freistin at søkja starvið var tann 14. apríl, innkomnar eru 5 umsóknir. Umsitingin ætlar at vera liðug við innstillingina í viku 18, og mælir til, at samanseta setanarbólkin, ið skal innstilla til starvið at vera:

- Fróði Mortensen, kommunustjóri
- Amy Bech, fíggjarleiðari
- Sólfríð Bech
- Eyka/ eftir tørvi Lasse Jensen, málsviðgerði

**Avgerð**

Einmælt samtykt at fylgja tilmælið hjá umsitingini við samansetingini av setanarbólkinum.

**29.09.00-A26-1-20**

## 4. Leingjan av tiltøkum at fyribyrgja smittu av Corona virus

### Málsfrágreiðing

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 17. april 2020 kl. 10:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan -Eykafundur |

**Kommunustjórin 5. mars 2020**
Kunning frá kommunufelagnum/ landslæknanum og landstyrismanninum í heilsumálum. Tykkum kunnugt er staðfest, at fyrsti føroyingur er smittaður av covid-19 – eisini rópt corona virus.
Í hesum sambandi hevur Landsstýrismaðurin í heilsumálum avgjørt at fylgja tilráðingunum hjá epidemikommisjónini um, at øll heilsustarvsfólk, starvsfólk í eldrarøktini, sum hava verið í Kina, Iran, Korea ella norðuritalia, skulu verða heima við hús í 14 dagar eftir, at tey eru komin heim. Hetta kemst av, at tað eru fyrst og fremst eldri borgarar og sjúk fólk, sum verða rakt meint, um tey verða smittað av corona virus.
Støðan broytist fyri hvønn dag, og fylgir umsitingin neyvt við tilmælum og leiðbeiningum frá Landslæknanum og Heilsumálaráðnum, fyri at kunna borgarar um støðuna, og seta í verk fyribyrgjandi átøk fyri at tálma at sjúkan spreiðir seg.

**Býráðið, 13. marts 2020, pkt. 1:**
Kunna var um at Jón Johannesen skúlastjóri, Bjørg Hofgaard deildarleiðarin í skúlanum í Trongisvági og Kari Petersen leiðari av barnagarðinum vór møttar á leiðslufundi í morgun, har tosa var um støðuna viðv. Corona-virus.

**Tilbúgvingarnevndin (Brunanevndin), 13. marts 2020, pkt. 1:**
Fundur um tiltøk í sambandi við COVID-19 smittuna. -Sí viðhefta tilmæli til Tvøroyrar Býráð. Nevndin er kunnað og tekur undir við tiltøkinum í tilmælinum.

**Kommunustjórin 13. mars 2020, Pkt.1**
Støðan við Corona virus broytist skjótt, og áheitanir eru frá Løgmanni, Landstyrið, Heilsumálaráðnum og Landslæknanum um at í verk umfatandi tiltøk kring alt Føroyar. Fyri at fylgja hesum ásetingum, verður mælt til her í Tvøroyrar kommunu at, niðanfyri nevndu tiltøk verða sett í gildið, og galdandi til mánadagin 30. mars 2020, kl. 08:00. -ella inntil onnur boð vera givin.

**Kommunustjórin 13. mars 2020, Pkt.2**
Umsitingin hevur fingið umsókn frá Suðuroyar sjúkrahús um at gera brúk av gomlu kommunulæknaviðtaluhølinum til royndarstovu.

**Pkt.1**

- ØLL SKÚLAGONGD Í TVØROYRAR KOMMUNU STEÐGAR Í 14. DAGAR FRÁ MÁNAMORGUNIN 16. MARS, KL. 08:00.
- BARNAANSINGIN OG FRÍTÍÐARSKÚLIN STONGJA Í 14. DAGAR FRÁ MÁNAMORGUNIN 16. MARS, KL. 08:00

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 17. april 2020 kl. 10:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan -Eykafundur |

- ØLL FRÍÐTÍÐAR TILBOÐ SUM TVØROYRAR KOMMUNA VARÐA AV STEÐGA Í 14. DAGAR FRÁ D.D.
- ØLL INNANDURÐA ÍTRÓTTAR- OG MENTANARTILTØK STEÐGAÐ Í 14. DAGAR FRÁ D.D.
- BARNATANNRØKTIN STONGIR Í 14. DAGAR FRÁ MÁNAMORGUNIN 16. MARS, KL. 08:00. -ÁTROKANDI TØRVUR VERÐA VIÐGJØRT, EFTIR AVTALU VIÐ TANNLÆKNAN.
- LOYVT VERÐA IKKI FREMMANDUM FERÐAMANNASKIPUM AT VITJA KOMANDI 14. DAGARNAR FRÁ D.D.
- ONNUR SKIP, SUM KOMA ÚR ÚTLONDUM, VERÐUR FORBOÐ SETT MANNINGINI AT KOMA Í LAND FRÁ D.D.
- UTTANDURÐA ÍTRÓTTARTILTØK EIGA HELST IKKI AT VERA, OG SKULU NEYVY FYLGJA TILMÆLUM FRÁ LANDSLÆKNA OG ÁSETINGUM FRÁ HEILSUMYNDULEIKUM.
- KOMMUNUSKRIVSTOVAN OG KUNNINGARSTOVAN LATA AFTUR Í 14. DAGAR FRÁ MÁNAMORGUNIN 16. MARS, KL. 08:00
- ALT NEVNDAR- OG FUNDAR VIRKSEMIÐ VERUR STEÐGAÐ Í 14 DAGAR FRÁ D.D., OG BERT ÁTROKANDI MÁL VERÐA VIÐGJØRD
- ØLL STARVSFÓLK Í FYRISITINGINI HJÁ TVØROYRAR KOMMUNU VERÐA SEND HEIM AT ARBEIÐA. VIÐ NØKRUM EINSTØKUM UNDANTØKUM.
- ØLL STARVSFÓLK, IÐ EFTIR ÆTLAN SKULU UTTANLANDS VEGNA KOMMUNUNA, VERÐA BIÐIN UM AT AVLÝSA FERÐINA. EISINI VERÐUR HEITT Á STARVSFÓLK UM AT AVLÝSA ALT SKEIÐSVIRKSEMIÐ OG FUNDIR.
- STARVSFÓLK, IÐ HAVA VERÐI UTTANLANDA HESAR SEINASTU VIKUNA, VERÐA BIÐIN UM IKKI AT MØTA TIL ARBEIÐIS KOMANDI 14 DAGARNAR

**Býráðið, 13. marts 2020.**
**Pkt. 1:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini. -Og galdandi fyri Ítróttarøkið við Stórá, verða reglugerðir settar í verk í samráð við umsitingina, har einans húsavørður og venjari hava atgongd til innandurða økið og felagshúsið.
Kristin Michelsen, borgarstjóri ynskir viðmerkt, at hann tekur ikki undir við at Snæran verður stongd-



Formansváttan

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 17. april 2020 kl. 10:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan -Eykafundur |

**Pkt. 2:** Einmælt samtykt at Suðuroyar Sjúkrahús fær loyvið til at brúka gamla læknahúsið til royndarstovu í 1 mnd. fyri fyrst.

**Kommunustjórin 23. mars 2020**
**Pkt. 1:** Støðan við Corona virus sýnist til at varða við, og áheitanirnar frá Løgmanni, Landstyrið, Heilsumálaráðnum og Landslæknanum eru enn galdandi, har heitt verður á allar borgarar, kommunur, fyritøkur, og stovnar, um at halda og fylgja tilmælinum og átøkum, sum eru set í verk fyri at tálma smittuvandanum av Corona virus, Covit-19. Kommunustjórin mælir til, at Tvøroyrar kommuna leingir tey átøk, sum vóru samtykt 13. mars, og at hesi vara galdani -og tillagaði eftir tørvi- inntil 14. apríl, ella so leingið sum tilmælini frá Løgmanni, Landstyrið, Heilsumálaráðnum og Landslæknanum enn eru galdandi.

**Pkt. 2:** Kommunustjórin mælir til at Suðuroyar Sjúkrahús fær loyvið til at brúka gamla læknamiðstøðina til royndarstovu í til 14. apríl 2020, og um tørvurin á hesum verður longi, verður hetta at viðgerða av umsitingini hjá Tvøroyrar kommunu.

**Býráðið, 25. marts 2020, pkt. 1:**
**Pkt. 1:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini, at tiltøkini verða galdandi fram til 14. apríl, ella so leingið sum tilmælið er frá landslæknanum
**Pkt. 2:** Einmælt samtykt at Suðuroyar Sjúkrahús fær loyvið til at brúka gamla læknahúsið til royndarstovu fram til 14. apríl, ella so leingið sum tilmælið er frá landslæknanum.

-Kristina Roest mælir til, at býráðsfundir verða stroymdir fyri almenninginum nú fólk ikki fáa møguleikan at møta til fund orsakað av Corona Virus.

**Kommunustjórin 16. apríl 2020**
DAGFØRT -TILLAGAÐ TILTØK VIÐV. KORONA VIRUS GALDANDI EFTIR 20. APRÍL 2020.
Landsins leiðsla hevur gjørt av at lata Føroyar spakuliga uppaftur 14. apríl eftir góðar 4 vikur, har so at siga alt virksemi hevur verið uppsteðgað orsakað av Covit-19, Korona kreppuni. Kommunufelagið hevur verði umboða í Coronaráðgevingina, sum hevur gjørt eina vegleiðing til varliga upplatiing av dagstovnum. Fyri Tvøroyrar kommunu merkir hetta, at tey tilmæli, sum umsitingin legði fyri býráðið, og blivu einmælt samtykt - fyrst 13. mars og seinni eisini 25 mars., tey verða nú tillagað og broytt samsvarandi vegleiðingina frá Coronaráðgevingini.

**<u>Tvøroyra býráð skal taka støðu til:</u>**

- Fylgja tilmælinum frá Coronaráðgevingini, har dagstovnar fara frá 20. apríl 2020 varliga at lata upp aftur við teirri fortreyt, at fleiri strong verjutiltøk verða fylgd.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 17. april 2020 kl. 10:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan -Eykafundur |

- Bráðsskrivstovan letur varliga upp aftur. Tey starvsfólk, sum møta til arbeiðis, skulu taka atlit til ásettu reglugerðirnar at forða fyri smittu. Tað er tó ikki eitt krav, at øll starvsfólk møta samstundis, men at hvør einstakur sjálvur ger av, nær viðkomandi møtir ella starvast heimanífrá.
- Starvsfólk, sum meta seg vera í vandabólki, um tey fáa korona smittuna og harvið eru serliga útsett, skulu boða frá hesum hjá sínum lækna.
- Kommunuskrivstovan letur upp aftur, tó við tí avmarking, at bert eitt viðskiftafólk sleppur inn í senn. Heitt verður eisini á fólk um í mest møguligan mun, at avgreiða síni viðurskiftir við kommununa umvegis tlf. 611085.
- Tillagingar vera gjørdar á kommunuskrivstovuni, fyri at minka um vandan fyri evt. smittu.
- Verandi tillagingar, at forða fyri smittu millum starvsmenninir á Teknisku deild halda fram, og vera hesar broyttar eftir tørvi.
- Reglugerðirnar galdandi á ruskplássinum halda fram.
- Barnaansingin og frítíðarskúlin lata varisliga upp samb. tilmælið frá Coronaráðgevingini.
- Barnatannarøktin heldur fram eftir 14. apríl eftir tilmælunum frá heilsumyndugleikunum, har bráðfeingis viðgerðir vera framdar eftir avtalu við tannlæknan.
- Fremmand ferðamannaskip og skip, sum koma úr útlondum, skulu fylgja ásetingum frá Coronaráðgevingini, tá fólk og manning koma í land.
- Uttandura ítróttartiltøk skulu neyvt fylgja tilmælum frá Coronaráðgevingini
- Kommunustýrisfundir og nevndarfundir verða tiknir uppaftur, við atlit til ásetingarnar frá Coronaráðgevingini
- Øll frítíðartilboð, sum Tvøroyrar kommuna varðar av, verða framhaldandi stongd eftir 20. Apríl. Umsingin fylgir neyvt við tilmælum frá Coronaráðgevingini, og støða verður tikin til hvørt einstakt tiltak sær:
    - Almenna svimjingin
    - Tiltøk/venjingar í ítróttarhøllini, fimleikahøll, skúlum v.m.
    - Tiltøk til eldri borgarar –Snaran, eldrahugnin, fimleikur v.m.
    - Ungdómshúsið -Pakkhús 4
    - Kvøldskúlin
    - Tiltøk í skúlanum annars
    - Øll innandura ítróttar- og mentanar tiltøk steðgað

Øll omanfyri nevndu átøk vera leypandi dagførd av umsitingini, so hvørt hetta verður mett neyðugt, í trá við ásetingarnar frá Coronaráðgevingini og landssinsmynduleikum annars.

**Avgerð**

17. april 2020



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 17. april 2020 kl. 10:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan -Eykafundur |

Einmælt samtykt at fylgja tilmælið frá umsitingini har dagstovna frá 20. apríl 2020 varliga at lata upp aftur við teirri fortreyt, at fleiri strong verjutiltøk verða fylgd. Og at umsitingin fylgir neyvt við tilmælinum frá Coronaráðagevingini, og tillagar tiltøkini samsvarandi framk til 4. mai 2020.

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 17. april 2020 kl. 10:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan -Eykafundur |

**Bók lisin**

**Fundur lokin** 17.04-2020, kl. 11:05

Kristin Michelsen

Bjarni Hammer

Anita Vibergsdóttir

Bogi Johannesen

Alvi Mortensen

Súsanna Bertholdsen



Formansváttan